Fylgiskjal 3

LM-086/2020

Viðmerkingar til

Uppskot til løgtingslóg um løggilding av elinnleggjarafyritøkum

§ 5, stk. 2 og stk. 3:

Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um hjávinnuløggildingar, undir hesum

1) at hjávinnuløggilding er treytað av, at eigarin av fyritøkuni samstundis fær góðkenning sum fakliga ábyrgdur í fyritøkuni eftir nærri reglum, sum landsstýrismaðurin ásetur, sbr. § 8, stk. 2.
2) at tað ikki eru onnur starvssett í fyritøkuni,
3) at talan ikki er um størri og fakliga meira krevjandi uppgávur.

Stk. 3. Løggilding, sbrt. stk. 2, hevur gildi í 5 ár, og kann verða longd, treytað av, at góðkenningin sum fakliga ábyrgdur samstundis verður longd, sbr. § 8, stk, 2. Elnevndin kann sýta at leingja løggildingina undir hesum, um tað ikki verður skjalprógvað, at skyldurnar eftir stk. 2 eru hildnar.

Viðmerking til § 5, stk. 3:

Hetta er mótsett prógvbyrði. Tað er ikki uppgávan hjá einum persóni at prógva, at hann *ikki* hevur gjørt nakað skeivt.Tað kann tí ikki vera uppgávan hjá einum hjávinnuløggildum elinnleggjara at prógva, at hann hevur hildið skyldurnar í stk. 2., nr. 2) og 3). Tí tá skal hann prógva

a) at tað ikki eru onnur starvssett í fyritøkuni,
b) at talan ikki er um størri og fakliga meira krevjandi uppgávur.

T.v.s. at hann skal prógva, at hann *ikki* hevur gjørt nakað skeivt

Tað má vera uppgávan hjá elnevndini at prógva, at hjávinnuløggildi elinnleggjarin ikki hevur hildið hesar skyldur.

Tað tykist vera løgið, at løggilding, sbrt. stk. 2, bert hevur gildi í 5 ár í senn. Kunnu møguligir skaðatilburðir ella líknandi rættvísgera hetta krav? Tað man vera ivasamt.

§ 8, stk. 2, nr. 4:

góðkenning sum fakliga ábyrgdari í fyritøkum við hjávinnuløggildingum, sbr. § 5, stk. 2, undir hesum at fakliga ábyrgdari heldur fakliga førleikan við líka eftir reglum, sum landsstýrismaðurin ásetur, herundir kann vera ásett krav um skeiðsluttøku.

Viðmerking til § 8, stk. 2, nr. 4:

Tað er órímiligt, at krav skal kunna verða sett einum hjávinnuløggildum elinnleggjara, at hann skal halda "fakliga førleikan við líka eftir reglum, sum landsstýrismaðurin ásetur, herundir kann vera ásett krav um skeiðsluttøku", tá ið hetta krav ikki verður sett einum "vanligum" elinnleggjara.

Hetta kann verða rættiliga kostnaðarmikið. Tað tykist, sum um hetta er ein roynd at køva teir smáu elinnleggjararnar við hesum.

Tað gongur fram av lógartekstinum, at ein hjávinnuløggildur elinnleggjari sjálvur ger el-arbeiðið. Harafturímóti kann tað væl vera, at ein størri elinnleggjarafyritøka hevur ein stjóra, sum eisini er tann løggildi elinnleggjarin í fyritøkuni. Ofta hevur ein slíkur løggildur elinnleggjari ikki nortið nakra elinnlegging í fleiri ár.

Hvør av teimum báðum omanfyri nevndu er tá best førur fyri ella kompetentur til at vera løggildur elinnleggjari? Tað er sjálvandi tann hjávinnuløggildi.

§ 13: Góðskuleiðsluskipan - viðmerkingar

Eisini hetta kann verða rættiliga kostnaðarmikið. Tað tykist, sum um at eisini hetta er ein roynd at køva teir smáu elinnleggjararnar.

Sjálvur havi eg verið góðskuleiðari hjá P/F El-Service á Skála í 2 ár. Hetta var fyrsta handverkarafyritøkan, sum varð ISO9000 góðkend. Sjálvur stóð eg fyri hesum arbeiði.

Ein sovorðin ella líknandi skipan

- kostar rættiliga nógv at innføra,
- krevur ein stóran part av einum fulltíðarstarvi í umsiting og verður tí fíggjarliga tung hjá einum minni elinnleggjaravirki ella hjá einum hjávinnuløggildum elinnleggjara at umsita
- hevur neyvan verið prógv um, at vanligt elinnleggjaraarbeiði hevur verið betur greitt úr hondum enn vanligt
- verður lættliga ein "deyð" skipan, tí bert ein persónur fæst við hetta, og restin ger, "sum teir plaga"

Tí vil eg staðiliga mæla frá, at kravið um Góðskuleiðsluskipan í § 13 kemur við í hesa lóg.

Niels Johannessen, maskinmeistaralærari

Vinnuháskúlin